# Rundskriv um standard venjarasáttmálar

(galdandi fyri Meistaradeildina og 1. deild hjá monnum og kvinnum)

**Date:** 03.10.2019
**Ref:** VH

**§ 1.** Starvsnevndin í Fótbóltssambandi Føroya hevur samtykt nýggjan standard venjarasáttmála galdandi fyri venjarar í Meistaradeildini, og 1. Deild hjá monnum og kvinnum.

*Stk. 2.* Feløg sum skulu seta ella leingja starvssetan hjá venjarum í deildunum nevndar í stk. 1, hava framyvir skyldu til at nýta FSF standard venjarasáttmála, sum kann takast niður í útgávu á føroyskum og enskum máli á heimasíðu FSF´s undir: "FSF" > "Oyðubløð".

*Stk. 3.* Áður gjørdar venjarasáttmálar verða verandi í gildi til hesar ganga út ella verða uppsagdar.

**§ 2.** FSF skrivstovan metir um innsendi venjarasáttmálin er innlatin fullfíggjaður, og eftirkannar um allir teigar eru rætt útfyltir og um sáttmálin er undirskrivaður av báðum pørtum.

*Stk. 2.* FSF skrivstovan kann nokta fyri at góðkenna venjarasáttmála, sum er innlatin ófullfíggjaður eftir meting FSF´s.

**Gildiskoma og revsing**

**§ 3.** Hetta rundskriv er samtykt av Starvsnevnd FSF´s og kemur í gildi beinanvegin.

*Stk. 2.* Feløg sum ikki fylgja ásetingunum í hesum rundskrivi kunnu revsast samsvarandi Agareglugerð FSF´s.

Tórshavn, 03.10.2019

Vegna Starvsnevndina

V. Hvidbro

…………………………………………..
Virgar hvidbro, aðalskrivari